# Lívslist

## Minimalisma, kitch & humor



**Verner Panton Relaxer 1974.** Panton gav nýtt lív til gamla ruggistólin í 1974. **Space-age** stólurin hóskar væl til nútíðarandan, við træi og bjørtum litum. Umframt, at hann er eitt satt listaverk á at skoða, hóskar hann væl til bæði stór og smá at sita í. **Relaxer** er ein herlig samanseting av minimalismu, kitch og humor, sum livir eins væl í dag, sum í 1974.

## Panton stólur til børnini



Verner Panton stólurin **Panton Chair** hevur altíð verið vælumtóktur hjá børnunum. Nú fæst hann eisini í einari minni útgávu, sum við litríku og rundu formunum bjóðar børnunum vælkomnum umborð.

## Fatboy Sekkja-stólur við Marimekko



Tú situr perfekt í **Fatboy** sekkja-stólinum, sum eisini er vakur á at líta við klassiska Marimekko mynstrinum. Stólurin er úr Nylontoyi, sum er lætt at halda.

## Kult keramikk



Hvíti kerma-mikk knagin bæði goymir og avdúkar í senn. Undir-parturin er ein vanligur knagi, sum verður skrúvaður inn í veggin. Omaná er eitt lítið leyst goymslurúm, til hvørt av sínum: fartelefon, mappu, endurskin, lyklar, busspengar ella okkurt heilt annað. Italski designarin Luca Nichetto frá fyritøkuni Bosa eigur hugskotið til upphangið, sum eitur **Applicata - Hook Book.**

## Ovala sól borðið



Morten Voss frá Voss Co Living er maðurin handan kula gula borðið **IO Oval**. Vit lata tað tala fyri seg..

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*